# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Lena Mørk 60 ár

Sunnudagin, 9. oktober, verður Lena Mørk, fødd Vang, 60 ár.

Lena hevur størsta partin av lívi sínum verið búsitandi í Havn, men ættarbondini hevur hon kortini úr Eysturoynni. Pápin var Jacob Andreas Vang av Glyvrum, og var hann sonn fiskiklógv. Mamman, Sanna Vang, var ættað úr Hoygarðinum á Toftum. Hennara leiklutur var, sum so mangan tá, at haldi hús og heim, men hóast hetta so smæddist hon ikki burtur, og millum annað var hon ein av grundstuðlunum í arbeiðinum at byggja Sjómansheimið í Runavík, eins og Missiónshúsið á Glyvrum var eitt av hennara hjartabørnum.

Lena flutti á ungum árum til Havnar, og eftir at hon eitt skifti hevði starvast hjá Hans Joensen, kom hon 1. mai í 1965 í læru á skrivstovuni hjá Restorff's, sum tá umfataði bæði handilin, P.A. Restorff og so bryggjaríið. Í Hera Olsen hevði hon ein góðan lærumeistara, og illa kann sigast annað enn, at starvið hjá Restorff's gjørdist hennara lívsstarv.

Í fleiri ár var hon partur av nevndini í felagnum, og tá kreppan av álvara fór at gera um seg seinasta partin



av áttatiárunum, tók hon saman við Aage Andersen, sum hon enn livir saman við, stóru avgerðina at keypa fyritøkuna.

Árini fram til 2002 var hon soleiðis stjóri á bryggjarínum, men um ársskiftið 2001/2002 tóku hon og Aage avgerð um at selja fyritøkuna. Fram til várið í ár starvaðist Lena kortini á skrivstovuni, soleiðis at talan nærum gjørdist um 40 ár á sama arbeiðsplássi.

Lena eigur tveir synir, Martin og Jákup. Eisini hevur hon tríggjar ommusynir. Teir eita Magni, Niels Áki og Mortan. Hon er burturstødd á føðingardegnum.

## John Johannesen 70 ár

Leygardagin 8. oktober fyllir John Johannesen, vanliga nevndur John á Selatrað, í Havn 70 ár.

John er ættaður av Selatrað, og hann hevur verið sjómaður meginpartin av lívi sínum. Hann sigldi t.d. við Royndini og Atlantsfarinum.

John fór at sigla við Baki hjá Skipafelagnum, tá hann kom til landið í 1961, tó undantikið tey tvey árini hann sigldi við Skúgvi hjá sama reiðaríi. Annars sigldi hann við Baki, til hann í 1993 bleiv seldur til eitt kanadiskt reiðarí.

Bakur var frystilínuskip, ið varð bygt til at fiska laks í Grønlandi og hemara við bretsku oyggjarnar og Kanada. Hann bleiv eisini



nýttur til at keypa sild í Skotlandi og til farmasigling.

Tey fyrstu árini sigldi John sum dekkari, men meðinpartin av tíðini sum maskinmaður.

Í 1976 keypti hann saman við øðrum Bak frá Skipafelagnum. Fyrstu tíðina royndu teir eftir svartkalva við Labrador, og nakað eftir hetta fóru teir burturav at royna eftir hemara við Kanada.

Í 1993 seldu teir Bak, og eftir at hava balst á sjónum síðan hann var heilt ungur, legðist John upp á land og fór at arbeiða hjá soninum Øssuri, sum tá hevði keypt Bilasøluna í Hoyvík. Hansara arbeiði har er at klárgera nýggjar bilar og annars alt fyrifallandi arbeiði á bilasøluni.

John er ein hugnaligur og arbeiðssamur maður. Hann hevur eitt lætt sinni og eitt sera gott minni. Eftir eitt langt lív á sjónum veit hann altíð okkurt áhugavert at siga frá.

Foreldrini hjá John vóru: Nicolina, f. Djurhuus, av Selatrað, og Tummas Johannesen, av Valinum á Tvøroyri.

John giftist í 1960 við Dagmar, f. Johannesen, frá Gjógv. Tey búsettust í Havn og eiga fýra børn: Tóra, Øssur, Ása, og Tróndur. Tóra býr í Danmark, Ása býr á Hvítanesi og Øssur og Tróndur búgva í Havn. John eigur 10 abbabørn.

✝

## Andlát og jarðarferðir

**Høgni Joensen, Tórshavn,** andaðist á Landssjúkrahúsinum hósdagin 6. oktober, 66 ára gamal.

Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

Kistan við **Onnu Stenberg** fer frá kapellinum á Suðuroyar Sjúkrshúsi fríggjadagin klokkan 18 til Sandvíkar kirkju.

Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 13.30. Sungið verður úr sálmabókini.

Tey, ið vilja minnast Onnu kunnu lata Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi eina peningagávu.

## Dagurin

**8. oktober. Ingibjørg**. Helst gamla danska navnið *Ingiburgh*, men eingin veit hví tað er komið í almanakkan. Navnið er av norrønum uppruna, samansett av gudanavninum *Ing* og *Bjørg*, ið kemur av sagnorðinum *at bjarga.*

**9. oktober. Dionysius**, deyður umleið ár 258. Hann varð vígdur til biskup av pávanum Fabiani og fór til Fraklands sum trúboðari. Varð saman við tveimum øðrum hálshøgdur á tí staðnum, sum nú eitur Montmatre, ið merkir *martýrfjallið*. Best kenda halgisøgan um Dionysius er, at hann eftir at vera hálshøgdur sjálvur bar høvd sítt til tann staðin, hann vildi verða grivin. Har var kirkjan St. Denis bygd.

*Símun av Skarði doyði hendan dagin í 1942.*

**10. oktober. Gereon**, deyður umleið ár 300. Eftir halgisøguni kristin herhøvdingi, sum varð tikin av døgum.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

✝

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara elskaði sonur, maður, pápi, bróðir, verpápi og abbi

**Høgni Joensen**
**Tórshavn**

andaðist á Landssjúkrahúsinum 6. oktober 66 ára gamal.

Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum sunnukvøldið klokkan 18.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mánadagin klokkan 13.

*Familjunnar vegna*

**Petra, Hanna, Suni, Jóna, Eyðna og Rúni**

Tey, ið vilja minnast Høgna við blómum, kunnu ístaðin lata Føroya Felag móti Krabbameini eina peningagávu.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt vístu manni og pápa okkara heiður og okkum samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæri

**Finnbogi Ísakson**

doyði og varð jarðaður.

Ein serstøk tøkk til Dupultkvartettina í Ebenezer og Havnarkórið.

Takk øll somul.

**Ása, Jón og Høgni**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri samkenslu og hjálpsemi, tá kæri maður, pápi, abbi og langabbi okkara

**Magnus Madsen**
**Tórshavn**

doyði og varð jarðaður.

*Fyri familjuna*

**Bergljót**